## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 15 og 18 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 17 stig.

# Svala sær á sandi…

**Ósmæðin ferðafólk kunna fáa nógv burturúr ein summardag**

SUMMARMYND
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Ein summarmynd úr Saksun, sum vit hava fingið sendandi, er ikki sum aðrar. Hendan dagin, myndin er tikin, er ein ferðabólkur á ferð í góðveðrinum norðanfyri. Ferðafólkini hava verið nógvastaðni bæði norðanfyri og vestanfyri. Tey eru stødd Úti á Pollinum í Saksun. Hetta er eitt avbera vakurt stað, ið nógv ferðafólk vitja á hvørjum ári. Í so máta er einki undarligt við hesum ferðalagnum.

Hendan dagin, tey vóru í Saksun, var løtan so góð, at tey fingu hug at svala sær á. Svimjiklæðini lógu tíanverri eftir heima, og tískil var einki uttan at leypa á bláman uttan nakran tráð á kroppinum. Aftaná var neyðugt at renna seg turran. Á sandinum og grasfløtuni á Pollinum liggur væl fyri at flyta seg fyri.

Tey leggja eina við, at tey vóru tey einastu í nánd. Bert nakrir ósekir seyðir í Saksun fingu høvi at uppliva ferðalagið.



*Tá eingi fólk vóru í nánd, hildu fólkini í ferðalagnum tað vera ráðiligt at leypa á bláman uttan ein tráð á kroppinum*

Tey lata heilsa, at túrurin í Føroyum var sera væl eydnaður, men heita tó á fólk um at hava svimjiklæði og handklæði við sær.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 18 |
| Aberdeen | 17 |
| London | 29 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 26 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 19 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 27 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 32 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 31 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 25 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 11 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst – ex »ALEX« – vestan fyri Írland fer spakuliga í útsynning og grynnist. Eitt hátrýst, 1028 hPa. við Lofoten fer spakuliga suðureftir.




Hátrýstið yvir Norska Havinum stendur mestsum í stað. Eitt brúgvalag í útsynning úr Føroyum stendur eisini í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/08 kl. $06^{00}$–09/08 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 13,6°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 08/08 kl. $06^{00}$–09/08 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í august: 14,9 mm

GEVIÐ BLÓÐ
Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 311397
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

7. aug.: Seinna kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini
16. aug.: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 10. aug | 03.20 | 15.44 | 02.20 | 14.44 | 02.35 | 14.59 | 05.20 | 17.44 | 06.20 | 18.44 | 01.35 | 13.59 | 00.35 | 12.59 | 03.35 | 15.59 | 04.35 | 16.59 | 03.05 | 15.29 | 04.20 | 16.44 |
| 11. aug | 04.09 | 16.34 | 03.09 | 15.34 | 03.24 | 15.49 | 06.09 | 18.34 | 07.09 | 19.34 | 02.24 | 14.49 | 01.24 | 13.49 | 04.24 | 16.49 | 05.24 | 17.49 | 03.54 | 16.19 | 05.09 | 17.34 |
| 12. aug | 04.58 | 17.22 | 03.58 | 16.22 | 04.13 | 16.37 | 06.58 | 19.22 | 07.58 | 20.22 | 03.13 | 15.37 | 02.13 | 14.37 | 05.13 | 17.37 | 06.13 | 18.37 | 04.43 | 17.07 | 05.58 | 18.22 |
| 13. aug | 05.45 | 18.09 | 04.45 | 17.09 | 05.00 | 17.24 | 07.45 | 20.09 | 08.45 | 21.09 | 04.00 | 16.24 | 03.00 | 15.24 | 06.00 | 18.24 | 07.00 | 19.24 | 05.30 | 17.54 | 06.45 | 19.09 |